NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Føðingar

Á myndini situr 11/2 ára gamli Benjamin við beiggja sínum sum var føddur 16. august 2007. Foreldrini eru Jana Mikkelsen og Eyðun Jakobsen úr Tórshavn

Fríggjadagin tann 17. august fingu Emil og Conni ein lítlan beiggja. Hann vigaði 3920 og var 54 cm langur. Foreldrini eru Malla Dam og Søren H. Jensen á Tvøroyri

20 juli bleiv Fríði stóribeiggi til hesa fittu diddu. Hon vigaði 3925 gram og var 53 cm long. foreldrini eru Jana Jacobsen og Signar Djurhuus Kollafjørður

Bjarki og Sólrun fingu ein lítlabeiggja t. 24.7.07 hann vigaði 3975 og var 54 cm langur. Hann var føddur á Herlev amtsygehus í Danmark. Ansa P. í Eyðansstovu og Fróði Skúvadal eru foreldur. Nú búgva vit øll í Vestmanna

13. august fingu Elsa og David Jørgensen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm.long og vigaði 3500 gr.

16. august fingu Jana Mikkelsen og Eyðun Jakobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4340 gr.

17. aug. 2007 Fingu Jeanne Waagstein og Louis Hansen, búsitandi í Malmø eina dóttir fødd á Glostrup Hospital. Hon var 51 cm. long og vigaði 3180 gr.

19. august fingu Maria og Pól Niklái Thorkildshøj, Hósvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3900 gr.

21. august fingu Diana Dahl og Dan Djurhuus, Vágur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4300 gr.

21. august fingu Siri og Jens Kristian Davidsen, Signabøur, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3900 gr.

22. august fingu Maria V. Joensen, Klaksvík og Jóan Hendrik Hultgren, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3600 gr.

23. august fingu Heidi og Erland Tvørfoss, Norðragøta, eina dóttur. Hon var 47 cm. long og vigaði 2600 gr.

Minningarorð um
Gunnar Martin Petersen

Um systurson mín Gunnarba sum hann vanliga varð nevndur. Tríggir mánaðir eru lidnir síðani hann fór úr hesari verð og upp til Jesus pápan; tað veit eg, hann er farin. Hann var so góður sum dagurin var langur.

Altíð stríddist hann við pínu, men ongantíð sást tað á honum. Altíð í góðum lag.

Tað besta honum dámdi, var at hava nógv fólk rundan um seg. Og inni hjá Ketty og Gunnarba var man altíð vælkomin. Har hevur man mangan sitið gott. At fortelja søgur var eingin sum hann. Man fór altíð út aftur við eium smíli. Og so segði man við seg sjálvan »Gunnarba er góður« ella handan var góð, sum hann fortaldi. Hjartagóður var hann altíð.

Aftan fyri einum góðu manni stendur ein góð kona. Ja Ketty, tú var honum ein góð kona. Vit vóru mangan har suðuri hjá tykkum og ferðaðust. Stuttligt var mangan at koma til Ketty og Gunnarba, har føldi man seg sum heima.

Gunnarba og Ketty eiga fýra børn og 6 ommu- og abbabørn. Saknurin er stórur hjá tykkum, men tit kunnu gleðast um at hava átt ein so góðan pápa, abba og mann. Gunnarba hevði trý systkin, Jóannes, Gudný og Minny. Saknurin er eisini stórur hjá teimum. Helst Jóannes sum býr á Tvøroyri, sum hann vitjaði hvønn dag. Hann var so góður við alla sína familju.

Góði Gunnarba, einaferð skulu vit øll hittast. Summi fara fyrr og onnur fara eftir. Soleiðis er lívið á foldum. Tað er ikki altíð lætt, men við einum løttum sinni sum Gunnarba hevði, so skal tað nokk ganga hjá okkum øllum.

Friður verið við minninum um systurson mín Gunnarba.

Johannis Hansen v/ fam.

Merkisdagar

Prógv
10. Juli fekk Sólfríð í Króki, Strendur, prógv í BA(hons) in Tourism/Marketing á University of Central Lancashire, Preston, Stóra Bretland.

14. august hevur John Syderbø úr Klaksvík lokið prógv sum cand. merc. innan marketing við lærda Háskúlan í Aalborg.

20. august i 2007 hevur Jónbert Davidsen lokið prógv sum Master of Arts í Heimsspeki og Donskum frá Syddansk Universitet, Odense, Danmark.

50 ár
Fríggjadagin 24-8 verður Jóan Hendrik Jacobsen Norðragøta 50 ár. Dagurin verður hildin Við Ánna 40, leygardagin 25-8 frá kl 11-15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

60 ára føðingardagur
27. august fyllir Katrin Mørkøre á Eiði 60 ár. Føðingar-dagurin verður hildin í Ítróttarhøllini á Eiði tann 26 august kl 14.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

75 ár
Leygardagin 25. august verður Jóhan Frederik Davidsen í Kvívík 75 ár. Dagurin verður hildin í Bøgøtu 10 í Tórshavn, í húsunum hjá Havnar Arbeiðskvinnufelag frá kl. 11-15.

80 ár
Sunnudagin 26/8 verður Rigmor Andreassen á Argjum 80 ár. Føðingardagurin verður hildin leygardagin 25/8 frá kl.10-15 í Reynstún 20 Argir.

Silvurbrúdleyp og rundur føðingardagur
25. august kl. 20 hava vit opið hús á dagdeildini á Tjarnargarði, Hoyvíksvegur 58, Tórshavn, tí vit fyri kortum høvdu ávíkavist silvurbrúdleyp og rundan føðingardag.
Heilsan Hensia og Finn

Brúdleyp
Leygardagin 25. august kl.13.30 giftast í Christians Kirkju á Amager Elin Joensen, Sandvík og Jens Berglid, Stokholm Veistlan verður fyri innbodnum á Dragør Strandhotel kl.16.00

Leygardagin 25 august kl. 15 giftast í Havnar Kirkju Heidi Mohr Poulsen og Niels Poul Holm, bæði úr Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í Havnar Róðraneystið kl. 19.

Leygardagin 25. august kl. 17 giftast í Dómkirkjuni Elisabeth Sigridardóttir úr Klaksvík og Kári Mikkelsen úr Tórshavn.Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.

Leygardagin 25. august kl.15 giftast í Fuglafjarðar kirkju Bertha Sigurðbjørg Lambaa úr Fuglafirði og Kristian Sune Haraldsen (Bassi) úr Hoyvík. Veitslan verður fyri innboðin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.

Leygardagin 25. august kl. 14 giftast í Ebenezer Erla Bech Jensen, Tórshavn, og Sólvit Nolsø, Dalur. Aftaná vígsluna verður móttøka, har øll eru hjartaliga vælkomin. Veitsla verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum á Argjum kl. 18.30.